# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein




## HEILSUCAFÉ

Leygardagin ber til at fara á Klaksvíkar Sjúkrahús og gera ymiskar mátingar og royndir. Sjúkrahúsið hevur Heilsucafé í sambandi við Torradagarnar. Landsstýrismaðurin í heilsumálum skal seta heilsucaféina, og Niklas Heri Jákupsson fer at tosa um strongd og lívsgleði. Fólk kunnu máta blóðtrýstið, blóðsukrið, gera konditióinsroynd og máta BMI.

**HEILSUCAFÉ**
Klaksvíkar Sjúkrahús
Leygardagin 19/2 kl. 14-18



## TÓNARÁK Í TORRATÍÐ

Uni Debes, Lív Næs og Tróndur Enni hava leygarkvøldið konsert í Klaksvík. Tey fara at spæla blues- og fólkatónleik, og konsertin verður í Leikalund. Uni, Lív og Tróndur hava spælt nógv saman seinastu tíðina, og tey kunnu øll framføra sangir sum sangarar og tónleikarar.

**UNI, LÍV OG TRÓNDUR**
Leikalund í Klaksvík
Leygarkvøldið 19/2 kl. 21.00



## GEKKO Á DVD

Gordon Gekko ger comeback í filminum Wall Street 2. Fyri 23 árum síðani fekk Michael Douglas eina Oscar-heiðursløn fyri leiklutin sum fíggjarmaðurin Gekko. Nú er Gekko komin úr geglinum og ger aftur um seg. Filmurin var nógv sæddur í biografum í fjør, men nú kanst tú hyggja eftir honum heima í stovuni.

**WALL STREET 2**
Dvd-filmur



## VÁGAMENN Í HØVUÐSSTAÐNUM

Leygarkvøldið fera kendi føroyski bólkurin Tinganest at spæla í Havn. Vágabólkurin við tiltikna ljóðinum fer á pallin í mentanarháborgin í høvuðsstaðnum – í Norðurlandahúsinum. Tinganest hava verið virknir í fleiri áratíggjund, og tónleikarar í bólkinum hava eisini givið tónleik út sjálvir. Leygarkvøldið ber til at fáa eitt uppliving við tí besta hjá Tinganest og tónleikarunum í bólkinum

**TINGANEST KONSERT**
Norðurlandahúsið
Leygarkvøldið 19/2 kl. 19.30

## NOTTS COUNTY KANN ARGA CITY



Stóra enska steypakappingin FA Cup er aftur á skránni hetta vikuskiftið. Fleiri av stóru feløgunum hava longu latið lív í kappingini, og tað var um reppið, at Notts County sendi Manchester City úr kappingini. Dysturin endaði tó við javnleiki, og tí hevur City nú fingið nýggjan møguleika at spæla seg víðari í steypakappingini. Og so er spurningurin, um teir nýríku seta mótstøðumenninar upp á pláss.

**MANCHESTER CITY-NOTTS COUNTY**
FA Cup
Sunnudagin 20/2 kl. 14.00




## WASMO Í HUNDRAÐ ÁR

Herbjørg Wassmo hevur skrivað eina skaldsøgu um mammu sína, ommu sína og langommu sína. Søgurnar um sterkar kvinnur í Norðurnoregi, sum hava stríðst fyri tilveruni seinastu øldina. Wassmo er djørv í nýggju skaldsøguni, og hon avdúkar eisini eymar familjuloynidómar. Sjálv sigur hon, at talan er ikki um hevnd, men um eina slektsøgu.

**HERBJØRG WASSMO**
Hundrede År
Lindhardt og Ringhof